Ummæli av Gospelfestivalinum 2000

Eitt ambo› í Guds hond

Hetta vikuskfti› var ta› sættu fer› at Gospelfestivalurin var hildin. Yvirskriftin í hesum ummælinum sipar til tann eina sangin, sum danska vitjanin í ár, Elsebeth Lindegaard og bólkur hennara sang og spældi. Annars var leygarkvøldi› alt sum ta› var ein rungandi lovsongur frá byrjan til enda, har fleiri føroyskir bólkar luttóku og sum eisini norski Jan Honningdal runda›i av vi› vi› fangandi lovsongi, eisini væl stu›la›ur av føroyskum tónleikarum og sangarum

VICTOR CARLSEN

Danska Elsebeth Lindegaard sannførdi rættiliga vi› síni framførslu, kanska serliga vi› lagnum »Jeg er en skovl, du er en spade«

Mynd: Jens K. Vang

Innkomin hetta kvøldi›, kendist ta› beinanvegin, sum at her fór naka› stórbært at henda. Frálíka Siloakóri› úr Fuglafir›i byrja›i vi› vøkrum kórsangi, og so hvørt sum framførslan lei› fram, gjørdist stevi› eitt sindur lættari, og aftaná væl framførda lagi› "Put your hand in the hand" vi› føroyskari t‡›ing, glapp ta› av munni hjá kórlei›aranum, at so vilt høvdu vit neyvan fyrr hoyrt kóri› syngja. Nei, ta› kann vera, men enn vantar eitt sindur í ta› verunliga gospel-frælsi› hjá kórinum at røra seg og tala meiri vi› kroppsmálinum, i› eisini hoyrir til slíka framførslu, men hetta man fara at koma, sum so mangt anna›. Sangúrvali› var væl fyrireika› og røddirnar vóru sera neyvar. Bæ›i í undirspælinum, har allir tónleikararnir eisini hava roynt seg saman vi› United Voices, og vi› kórinum var nógv gott at hoyra. Nøkur lovsongsløg, sum t.d. "Eingin er sum tú", "Tak mína hond" og "Tína d‡rd tú offra›i" vóru eisini á skránni, og enda› var› vi› einum frálíkum lagatyssi. Kóri› sjálvt telur um 30 fólk, sum eru samla› úr flestu brø›rasamkomunum í Eysturoynni. Tykkum ver›a ynskt gó› framtí›arynski, vi› vón um at skjótt hoyra tykkum aftur.

Vit fingu sí›ani tvær dansiframførslur. Hetta vi› dansi er naka›, sum er komi› fyri at vera ein partur av einihvørji framførslu. Lovsongur og dansur sømir seg teim kristnu. At hetta so samstundis kann vera ein bo›skapur í sjálvum sær, er bert at fegnast um. Bólkarnir dugdu sera væl, og alt samstemma›i í eina heild, bæ›i tónleikur og rørslur, og bar hetta bo› um ein altvaldandi Gud, i› eisini er persónligi vinur okkara.

Heini Lützen var aftur vi› festivalinum í ár. Eg vil siga ta› so, at Heini altí› fangar fjøldina vi› síni framførslu, um hann so stendur og syngur vi› egnum guitarafylgispæli, men hesa fer› hev›i Heini gott undirspæl. Heini megna›i sera væl allar teir ymsu stílar, hann hevur, heilt frá melodiøsum lovsongi til rock og country. Alt var ein gó› samla› eind. Eitt sindur harmiligt at Heini mátti k‡ta seg so nógv fyri at fáa lurtarafjøldina vi› sær í at syngja ni›urløgini vi›, hóast hann las reglurnar upp frammanundan. Sum heild eitt alt og stirvi› publikum, i› ikki tordi at vísa kenslur fyri teimum, i› framførdu. Eru vit Føroyingar bara so bangnir fyri at vísa okkara takksemi, tá ta› ræ›ur um okkara egnu sangarar og tónleikarar? Ør›vísi er tá ta› eru útlendingar, tí tá er einki í vegin vi› at bæ›i klappa, rópa, syngja, standa uppi og hvat veit eg. Sjálvt vi› lagnum "I´ve been delivered" var ta› illa nokk møguligt at fáa endarnar uppfrá. Lítla systurin hjá Heina, sum sang vi› var eisini eitt upplivilsi vi› sínum korsangi. Sum heild Heini, ein sera væl framførdur partur vi› verunligari kenslu fyri bo›skapinum í sanginum.

Ey›un Jacobsen í sínum rætta lovsongsstíli

Mynd: Jens K. Vang

Ey›un Jacobsen vi› tónleikarum og sangarum var so næsti bólkur. Ey›un er royndur sangari og ikki minst eisini lag- og tónasmi›jur. Framførslan byrja›i rættuliga spennandi vi› sløktum ljósi og eini upplisnari frágrei›ing um Paulus og Silas, i› sótu innistongdir í fangahúsi. Í hesi ney› teirra byrja›u teir at syngja lovsong. Kanska ikki júst: "An avesome God", men okkurt líknandi. Kortini ein gó› mynd uppá ta›, sum vi›ari skuldi koma. Ta› merktist at øll 15, i› luttóku á pallinum ikki vóru heilt avstemma›, ella kanska venjingin ikki hev›i givi› ta›, sum verunliga ætlanin og meingin var vi› framførsluni, men kortini ein sera gó› framførsla. Anleggi› sveik ta einu løtuna, men so var aftur alt í fullari gongd. Eg skilji væl Ey›un, men ta› er jú ikki ta› sama at standa fram í eini konserthøll og skula syngja lovsong til eitt slíkt høvi, sum Gospelfestivalurin er, eins og ta› er at vera í egnum heimligum samkomuumhvørvi. Persónliga frælsi› og kenslur yvirhøvur eru ikki júst tær somu. Av somu orsøk er ta› ikki heilt lætt at skula framføra slíkar sangir. Her hev›i ein meiri móttakilig lurtarafjøld lætt væl um samla›a úrsliti›.

Eftir ste›gin var nú bor›reitt vi› útlendskari vitjan. Fyrsta navni› var danska Elsebeth. Komin inn á pallin byrja›i hon at syngja samanhangandi tvey løg uttan at siga naka›, so her helt eg at nú fáa vit eina turrisliga framførslu, sum bara skuldi fáast av vegnum, men her fór eg skeivur. Elsebeth byrja›i at grei›a frá sær og sínum sangum, har tann eini var› skiva›ur av henni, tá hon var bert 10 ára gomul. Hesin sangurin meti eg sum tann besti hetta kvøldi›, og er hann eisini ein partur av yvirskriftini hjá mær til

hetta ummæli›. "Jeg er en skovl, du er en spade" var ein sangur, sum kom fram eftir hon var vor›in arga› í skúlanum og ein drongur í klassanum hev›i kalla› hana fyri eina skovl. Heimkomin gramdi Elsebeth seg fyri mammuni, sum uggandi seg›i henni, at ta› skuldi hon ikki taka so tung, tí skovlin var jú eitt ambo›, og hevur tú eitt ambo›, so kemur eitthvørt gott burturúr. Vi› hesi kenslu skriva›i Elsebeth so sangin, ímyndandi okkum øll sum ambo› í Guds víngar›i. Flestu sangir hennara vóru av bá›um fløguútgávum hennara. Eg beit serliga merki í kórsangarararnar, sum vóru ótrúliga tryggir í síni uppgávu, sera livandi og settu sín rættuliga dám á framførsluna. Tónleikaranir ikki minst, eitt sera gott orkestur - serliga klaverleikarin, sum eg skilti er sera væl útbúgvin á konservatoriinum í Århus, ta› hoyrdist.

Børnini lurta›u eisini vi› áhuga

Mynd: Jens K. Vang

So var tí› til at lata Jan Honningdal or›i›. Jan er sera tryggur í síni framførslu, men ta› var verunliga bert ta› fyrsta lagi›, i› var n‡tt frá hansara sí›u hesa fer›. Jan dugir væl at skriva løg og ikki minst tey, sum fanga skjótt og liva væl og leingi. Jan n‡tist heldur ikki at taka vi› sær sangarar og tónleikarar úr Norra, tí ta uppgávuna megna›u føroysku luttakararnir sera væl. Jan fekk sera gó›a hjálp her og ta› var hann eisini sera væl nøgdur vi›.

Sum fyrr nevnt, so er ta› ikki júst so gott forum at bor›rei›a vi› lovsongi til eina framførslu sum hesa í Nor›urlandahúsinum, sum ta› er í egnum heimligum samkomuumhvørvi, so eisini her mátti Jan duga sær hegni› at kunna enda. Hetta bar sera væl til, og Jan prógva›i enn eina fer›, at her er hann toppprofesionellur.

Sunnukvøldi› var eitt sokalla› popp & rockkvøld, har fyrsti bólkurin "The Jesus Band" byrja›i. Ta› stuttliga vi› hesum nærum n‡byrja›a bólki var at teir høvdu tiki› sangin "Hvør skapti blómurnar" vi› á skránni sungnan í reinum rock-stíli. Hetta var so bert ein partur av samla›u skránni, men spennandi ver›ur at síggja, hvat framtí›in fer at bjó›a her. Haldi› bara á.

Bólkurin Liquvid Gravity er ein bólkur, i› er samsjó›a›ur av ungum fólkum úr Filadelfiasamkomuni í Havn. Ein sera væl samanspældur bólkur, i› á sín serstaka hátt vildi vera vi› á festivalinum og kundi vísa eitt sera moderna› andlit innan sang og tónleik. Løgini, sum framførd vóru høvdu teir sjálvir skriva›, so hetta var sera forkunnugt í sjálvum sær.

Munurin á bá›um kvøldunum var, at lurtarafjøldin var meira vi› sunnukvøldi›, og ta› er at fegnast um. Fyriskiparin dugdi eisini sera væl at fáa samskipan í lurtararnar, vi› at lata teir luttaka í felagssangi, og setti hetta sín serliga dám á kvøldi› eisini - avgjørt vert at royna aftur.

Eitt av føroysku innsløgunum var Siloakóri› úr Fuglafir›i

Mynd: Jens K. Vang

Dansibólkurin A2J var so aftur vi› hetta kvøldi› og líktist henda framførslan tí fyrru, i› eiisni hev›i sín serliga bo›skap.

Bólkurin Saltbrø›ur var ein kanska meiri popputur bólkur vi› 11 luttakarum og hevur luttakarar úr Eysturoynni. Forkunnugt var at hoyra tey tí tey dugdu sera væl at koma vi› virknum innsløgum til sangirnar, eins og eitt sindur av "showi" íblanda›. Sangúrvali› var partvís kent frammanundan, men eisini eitt gott innslag til komandi festivalar.

Sum fyrr nevnt er dansur eftirhondini blivin ein fastur táttur, og so var eisini hetta kvøldi›, vi› ta› at tey tr‡ Rakul, Høgni og Theodor dansa›u sera forkunnugan og serstakan dans vi› heilt ør›vísi tónleiki og ljósshowi. Ein svíkur í framførsluni var, at ljósi› hev›i ikki veri› roynt til framførsluna, men hetta kann bøtast uppá til næstu fer›. Avgjørt vert at royna aftur.

Jan Honningdal var á tri›ja sinni á føroyavitjan og ta› sást og hoyrdist at hann er ein rættur lovsongslei›ari

Mynd: Jens K. Vang

Bólkurin I Am úr Klaksvík er jú sera kendur, og royndi seg eisini vi› n‡skriva›um løgum hesa fer›, og ta› kemst neyvan uttanum, at teir eru sera tryggir, bæ›i hvat vi›víkur sangi, tónleiki og framførslu. Mikkjal er faktiskt tann berandi parturin í bólkinum og má eftirhondini metast sum ein tann mest habili tónleikarin vit hava í Føroyum eftirhondini á sínum øki. Bólkurin hevur eisini lati› skína ígjøgnum at teir vilja luttaka á mongum stø›um, enntá eisini á sokalla›urm "versligum" tiltøkum, og ber hetta prógv um at teir ikki seta sítt ljós undir skeppu, men vilja skína fyri Jesus.

Sjálvandi mátti sangurin "Believe" takast umaftur me›an ballónirnar duttu undan loftinum og settu eitt veruligt gott punktum fyri ársins gospelfestival.

Samanumtiki› kann sigast, at Gospelfestivalurin fyri mítt vi›komandi hesa fer› var eitt gott upplivilsi. Vit hava enn einafer› fingi› eitt prógv um at føroyska gospeltónleikinum er gott lív laga›. Kortini, so siti eg vi› eini kenslu av at ta› manglar eitt sindur av ø›rum sang- og tónleikastílum á einum so stórum forum sum festivalurin er. Kanska tit, sum fyrireika›u eru eitt sindur skerdir, tá hugsa› ver›ur um at tit bara hava tvey kvøld hesa fer›, men fáa tit tr‡ kvøld eina a›ru fer›, so eiga tit at leggja tykkum eftir at gera kvøldini ríkari, anna› enn vi› kór- og lovsongi, poppi og rocki. Kanska enntá barnasangir kundu fingi› rúm?

Vit hittast aftur næstu fer› til Gospelfestival, ivaleyst í broyttum líki frá tí, vit hava uppliva› higartil. Vit bí›a vi› spennigi.